# EIN TUNNIL KA

**BYGDAMENNING** - Tað skal ikki nógv til, fyri at gera tað liviligt í Svínoy. Fekk oyggin ein 1700 metrar langan tunnil Yvir í Havn og eina ferjulegu har, so hevði verið munandi øðrvísi, sigur 72 ára gamli svínoyingurin, Atli Jacobsen. Hann búði her fram til 1978, tá hann bygdi sær hús á Eiði, haðani konan eisini er ættað.



Tekstur: Snorri Brend
Myndir: Jens Kristian Vang

Svínoy: - Fingu svínoyingar bara EIN tunnil, so hevði tað verið fantastiskt, sigur hann.

Tað var tann tíð tá kalsoyingar fingu sínar tunlar og sína ferjulegu, og sum aftur hava skapt livilíkindi hjá fólkinum har.

Fyri Atla er eingin ivi um, at hendi hetta framstigið eisini fyri svínoyingar, hevði úrslitið verið tað sama:

Bygdin hevði ment seg aftur; fólkið høvdu kunnað búsett seg her; arbeiðspláss kundu verðið skapt herúti; og onnur høvdu kunnað arbeitt aðrastaðni, tí tað bert tók smáar 10 minuttir at sigla til Hvannasunds.

- Ja, fingu vit bert ein einstakan tunnil, so var oyggin bjargað. Men tað vísir seg at vera trupult at fáa hetta málið loyst, sigur Atli Jacobsen.

Kom tunnilin og kom ferjulegan á trygga og kyrra plássinum Yviri í Havn, høvdu møguleikar fyri aling á sjónum eisini verið avbera góðir.

- Tú sært, - her eru møguleikar at skapa arbeiðspláss, men so má okkurt alvorligt henda nakað skjótt.

## Finna uppá

Mikudagin fór Atli enn einaferð til heimbygd sína. Í dag er hetta ein ferð, ið ein ikki noyðist at hugsa so nógv um, ella gera tær stóru fyrireikingarnar til.

Tá var øðrvísi at fara av oynni ella út aftur higar fyri 72 árum síðani. Og tá satt skal verða sagt, var tað helst meiri hugaligt at koma til Svínoyar í árunum eftir seinna heimsbardaga, tá Atli gekk í skúla her.

- Ja, tonk tær til: Tá vóru vit 34 børn í skúlanum. Ein lærari hjá okkum var Meinhard Johannesen sum seinni varð lærari í Klaksvík. Hann var sonur Lamba-Jóhan. Karl og Andreas vóru eisini lærarar her, greiðir Atli á.

- Í dag er munur á, nú yngsta fólkið í oynni er 24 ár.

Ein annar munur var eisini tað sum børnini spældu við. Í eini slíkari bygd við stórfingnari náttúru var altíð okkurt at taka sær til.

- Vit máttu bara finna uppá sjálvi. Tað var ikki sum nú, ið tú bara kanst fara í BR at keypa tær leikutoy, sigur Atli við einum brosi.

- Tey yngru plaga at spyrja meg, hvat vit fingu dagin at ganga við. Eg veit ikki, - vit høvdu altíð okkurt at tríva í. Dagarnir rukku faktiskt ikki til, og heldur ikki kvøldini, tá vit elskaðu at gera fortreð hjá fólki og fáa teir at renna eftir okkum.

**» Fingu vit bert ein einstakan tunnil, so var oyggin bjargað. Men tað vísir seg at vera trupult at fáa hetta málið loyst**

## Úr 250 til 20

Eins og so manga aðrastaðni var bygdarlívið tá merkt av útiarbeiðandi sjómonnum og heimaarbeiðandi sjómanskonum.

Eins og so mangir aðrir unglingar, fór Atli eisini til skips í 1954, tá hann bert var 14 ára gamal. Um hetta mundið var Svínoy ein rættiliga stór bygd. Her búðu eini 250 fólk og góður trivnaður var í bygdini.

- Og nú, - nú veit eg ikki um tey eingang koma upp í 20. So vánalig er støðan í dag, sigur Atli harmur á málinum.

Tann stóra afturgongdin byrjaði seinast í 50'unum, tá fólk fluttu av oynni. Tey flestu fóru annaðhvørt til Klaksvíkar ella til Havnar. Har vóru arbeiði at fáa, í mun til heimbygdina har einki var.

- Tað vóru fleiri sum fóru, men eg haldi at tað var serliga eitt ávíst tíðarskeið at nógvar familjur fluttu av oynni.

- So steðgaði tað tíbetur eitt sindur á, men bygdin minkaði kortini so líðandi til tað sum hon er í dag, sigur hann.

## Elstur í Kollinum

Atli fór sjálvur av bygdini í 1978, og búsettist á Eiði hetta árið, tí sum hann brosandi tekur til: - Tú, veitst hvussu tað er: Man fær sær eina konu aðrastaðni frá, og hon vinnur altíð.

- Eg hugsaði við mær sjálvum, at tað gjørdi akkurát tað sama fyri meg, hvar eg búði. Eg var kortini til fiskiskap í Barentshavinum ta mesta av tíðini.

Tey fingu sær grundøki á Eiði, og bygdu í roynd og veru tey fyrstu húsini á staðnum sum eiðisfólk kalla í Kollinum í 1978.

- Eg plagi at siga tað við eiðismenn, at eg eri elsti maður í Kollinum. Ja, 33 ár, tey ganga eisini skjótt, sigur Atli, sum legði av at roykja sama dag sum tey fluttu inn í nýggju húsini.

Tey eiga trý børn, harav sonurin hevur fingið arbeiði á nýggju smoltstøðini í Svínoy, her tey eisini hava bygt sær eini summarhús.

- Men annars er ikki nógv gongd í byggjarí'num her úti. Nøkur summarhús, men ikki stórt annað enn tað.

**» Tá alt fólkið búði her, gingu tey og tvassaðu í runu á bygdarvegunum. Í dag eru allir vegirnir asfalteraðir, men nú er eingin at ganga eftir teimum**

## Keðiligt

Sum gamal svínoyingur hevur hann við harmi kunnað staðfest, hvussu bygdin er minkað til tað sum hon er í dag.

Eitt kvøldið sat hann uppi í summarhúsunum og hugdi oman yvir bygdina, samstundis sum hann gjørdi sær sínar hugleiðingar um støðuna.

- Eg fór tá eftir øllum húsunum, og kundi við sorg ásanna, at í hasum húsunum búði eingin; í teimum næstu ein gamal drongur; í tí triðja ein gomul kona; tað fjórða húsið stóð tómt og so framvegis.

- Ja, soleiðis er tíverri lívið her úti: Eitt tómt hús fyri og annað eftir. Eg veit ikki, hvussu nógv tóm hús standa herúti - kanska eini 40, eg veit ikki. Men tú skilir, at hetta er øgiliga keðiligt, slær Atli fast.

Men hann hevur gjørt eina sera áhugaverda eygleiðing aftrat: Umstøðurnar í bygdini, - tí samstundis sum fólkatalið er minkað, hevur bygdin ongatíð verið í betri standi enn júst nú.

- Tá alt fólkið búði her, gingu tey og tvassaðu í runu á bygdarvegunum. Í dag eru allir vegirnir asfalteraðir, men nú er eingin at ganga eftir teimum.

- Tað er rættiliga keðiligt at bygdin er minkað soleiðis, men av tí at oyggin er so sløtt, eru møguleikar fyri at menna hana aftur. Her er so nógv uppland og slætt, at øll húsini í Klaksvík kundu ligið her úti. So her er ikki mangul uppá pláss.